# Kvøldseta á Landsbókasavni

Í sambandi við norðurlendsku bókasavnsvikuna verður kvøldseta á Føroya Landsbókasavni mánakvøldið 9. november við fyrilestrum, upplestri og tónleiki. Norðurlendska bókasavnsvikan í ár snýr seg um evnið »kríggj og frið í Norðurlondum«, og serliga verður dentur lagdur á merkisárið 1809, tá svenska ríkið fór í tvey og Svøríki, sum vit kenna tað í dag, varð til, meðan Finland bleiv eitt stórfúrstadømi undir tí russiska keisaranum. Zakarias Wang fer at halda fyrilestur um kríggj og frið í Norðurlond við heitinum »1809 – árið sum broytti Norðurlond«. Niels Midjord og Petur Jacob Eliasen syngja og spæla. Turið Sigurðardóttir heldur fyrilestur um finska tjóðarskaldið Johan Ludvig Runeberg. Carl Jóhan Jensen fer at lesa upp yrkingina Flaggberin Stál eftir Runeberg. Hanus Kamban hevur týtt til føroyskt. Kvøldsetan byrjar kl. 19.00 og tað er ókeypis atgongd.



# BP stóra bót

Bretska oljufelagið BP skal gjalda 450 milliónir krónur í bót fyri vantandi trygd á einum reinsiverki, sum felagið hevur í amerikanska statinum Texas. Tað er amerikanska arbeiðseftirlitið, sum hevur ásett bótina, ið er tann størsta, sum nakað felag hevur fingið frá eftirlitinum. Eftirlitið sigur, at BP fær bótina, tí felagið hevur ikki ikki bøtt um trygdina á reinsiverkinum eftir eina spreinging fyri fýra árum síðani. Spreingingin kostaði 15 arbeiðsmonnum lívið, og 170 fingu skaða. Leiðslan í BP hevur mótmælt revsingini og vil ikki rinda bótina, skrivar AP.



*Elisabeth, kona Árna Olsen, og synirnir Bjarni og Sjúrður Olsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Eyðun Joensen undir liðini á bringumyndini av Árna Olsen*

*Mynd: Jan Müller*

mammu í síni avmakt og stóru sorg yvir at vara av tvinnum illa sálarsjúkum synum skelda Árna Olsen fyri, at hann so lítið megnaði at hjálpa upp á sjúku synirnar.

Hon var ikki heilt virðilig í síni øði, var spinnandi óð og leyp greitt framav. Men tað var Árni ikki upp í móti, men lurtaði, tugdi og svølgdi. Hann kendi týdningin av í slíkum vási at vera virðiligur sjálvur, væl vitandi um, at slíkt vónsvik og øði hjá slíkum fólki var púra normalt, og virkaði tað so eisini sissandi og avsvalandi upp á hesa óðu mammuna.

Men aftaná umgangin var Árni tíðiliga móður, keddur, bleytur og eyðmjúkur, og er tað ein síða av hansara persónleika, sum eg helt eisini klæddi hesum annars so handlekraftuga manni, segði Eyðun Joensen.

## Gott arbeiðspláss

- Hann hevði eini einastandandi evni til at fáa tað besta burturúr sínum fólki, var opin fyri nýggjum hugskotum, kravdi nógv, men stóð samstundis altíð sum aftasti bakkur.

Hann má onkusvegna saman við øðrum leiðandi starvsfólkum hava havt tilelvandi, kveikjandi og mennandi ávirkan á yngri meðarbeiðarar, sum ofta seinri og aftaná framhaldsútbúgving uttanlands vendu aftur til psyk.deild at starvast á ovastu rókum og saman við honum at bera førningin víðari fram, segði Eyðun Joensen.

Psykiatriska deild hevur allar sínar dagar verið tiltikið gott arbeiðspláss, eisini tá deildin vegna peningatrot og skerjingar hevur ligið tungt í sjónum.

- Eg minnist einki til klandur og stríð, men at komandi og farandi starvsfólk bara hava róst arbeiðsanda og trivnaði, eins og mong hava starvast har alt sítt virkna lív, og onkur er har enn, segði Eyðun Joensen.

Ísáðing, kleking, føðing, uppstartur, byrjan og fyrstu 30 árini vóru greitt Árna Olsensa verk og epoka, hóast onnur og hvør í sínum lagi knáð fólk komu at standa honum við lið fyri síðani at taka yvir.

Væl vóru vit øll ymisk, tó øll høvdu onkrar serligar dygdir, og saman og í góðum samstarvi gekk alt upp í eina hægri og margfalda eind, vónandi sjúklingum, næstringum og øllum Føroya fólki at frama, segði Eyðun Joensen.



*Andreas Andreasen, myndahøggari, hevur gjørt bringumyndina av Árna Olsen, sum skrivarin, Tordis Johannesen, avdúkaði*

*Mynd: Jan Müller*

# Spentur at síggja bringumyndina í bronsu

**Andreas Andreasen hevur staðið fyri at gera bgringumyndina av Árna Olsen, og hann er væl nøgdur við endaliga úrslitið**

HÁTÍÐARHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Andreas Andreasen, myndahøggari, var væl nøgdur við bringumyndina, hann hevur gjørt av Árna Olsen.

- Eg haldi, at hon var væl móttikin. Eg var sjálvur spentur upp á at síggja hana í bronsu, tí sjálvur hevði eg gjørt hana úr gipsi, sigur Andreas Andreasen.

Bringumyndin er stoypt í bronsu í Danmark eftir skabelónini hjá Andreas Andreasen.

- Gips er eitt rættiliga deytt materiali, og eg var sjálvur spentur upp á, hvussu hon kom at taka seg út í bronsu, sigur hann.

Tað er Tordis Johannesen, sum øll árini hevur verið skrivari hjá Árna Olsen, ið hevur fingið arbeiðið í lag.

- Eg havi arbeitt út frá myndum, og eg fekk alt tilfar, ið tøkt var. Sonurin, Bjarni Olsen, sat modell eina tíð, men eg helt ikki, at teir líktust nóg mikið til, at eg kundi brúka hann, og sama var galdandi við hinum beiggjanum, Sjúrði, sigur myndahøggarin.

Hann endaði tí við bert at hava fotomyndir at arbeiða út frá, men hann er kortini væl nøgdur, nú endaliga úrslitið varð avdúkað leygardagin.